Starvslýsingar
á portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo

# Íslendska Umboðssølan


*Birgir Bjarnason, stjóri á íslendsku umbo›ssøluni*

**Ein av fyritøkunum, sum kemur til Føroya í samband við vinnuráðstevnuna, er Íslendska Umboðssølan. Birgir Bjarnason greiður frá, at ætlanin við ferðini til Føroya er, at finna lítil og miðalstór feløg, sum hava áhuga í einum øðrum søluliðið til teirra vørur**

Síðan 1970 hevur felagið Íslendska Umboðssølan selt sjógæti og sjógætisvørur runt um í heiminum. Talan er um frystan, saltaðan og turran fisk, ið tey selja. Birgir Bjarnason, stjóri, sigur við Sosialin, at Íslendska Umboðssølan fyrst og fremst er inni á tí evropeiska marknaðinum, men hann dylur ikki fyri, at teir eisini javnan selja til tey stóru fjarskotnu londini sum Amerika, Kanada, Russland og Kina.

"Okkara stórsti marknaður er helst niðri í suðurevropa, men vit eru eisini virkin aðrastaðni", fortelur Birgir Bjarnason fyri okkum.

Íslendska Umboðssølan selur nógvan ymiskan fisk, men tað er fyrst og fremst toskur, reyðfiskur og hýsa, sum fyritøkan selur mest av. "Vit gera mest við tann fisk sum livur á okkara leiðum", sigur hann. Sostatt er tað talan um Íslendskan fisk, sum teir selja mest av.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Íslendska Umboðssølan hevur við Føroyar at gera. "Vit hava onkuntíð áður selt fisk til Føroya, og tað samstarvi hevur rigga væl", sigur Birgir Bjarnason.

Íslendska Umboðssølan leggur seg eftir at tryggja sær, at tey altíð veita eina framúr tænastu og ein rættvísan prís til framleiðarar. Eisini vilja tey leggja seg at veita eina trygga og góða tænastu í samband við sendingina av fiskinum til keyparan.

Íslendska Umboðssølan leggur seg eisini eftir at halda allan flutningskostnað niðri á tí minimala.

## Altjóða royndir

Fyritøkan er annars serkøn í altjóða handli við fiski. Íslendska Umboðssølan hevur í ígjøgnum 30 ár bygt upp royndir og vitan, sum ger at tey eru sera kappingarføri í hesum tíðum. Tað er týdningarmikið, at tey altíð hava eitt gott samband við kundarnar, soleiðis at tey kunnu menna álítandi vinnuviðurskifti millum keyparar og seljarar.

"Globaliseringin ger at tú samráðst, keypir og selur til fólk runt um í heiminum, og tá er tað gott hjá okkum, at vit hava verið í vinnuni so leingi, tí tá fáa kundarnir eitt ávíst álit á okkum".

"Vit koma til Føroyar fyri at styrkja um netverkið, og vónandi finna vit eisini onkrar møguligar kundar. Vit eru sjálvandi altíð áhugaði í at vaksa um fyritøkuna, so hetta er ein natúrligur liður í hesum", sigur Birgur Bjarnason.




**…duga at Samskipa**

- Hóskvøld av Klaksvík
- Leygardag í Immingham
- Mánadag í Rotterdam
- Framflutningur til Fjareystur, Suður- og Eystureuropu, Ameriku og Afriku
- Fríggjakvøld úr Århus
- Árla mánamorgun í Føroyum
- Beinleiðis til Føroya úr Reykjavík, Immingham, Rotterdam, Cuxhaven, Varberg og Århus

www.samskip.fo

SAMSKIP

SP/F Samskip • Yviri við Strond 23 • Postboks 3255 • FO-110 Tórshavn • Tel. +298 308800 • Fax +298 308801 • torshavn@samskip.com